## VIÐMERKINGAR

# Broytingar eru neyðugar, um vit skulu hava vøkstur og vælferð

**Vit skulu gera tað meira forkunnugt at stovnseta egnar fyritøkur í Føroyum. Grundarlagið undir hesum skal vera, at útbúgvingarskipanirnar verða fluttar nærri at vinnulívinum, og eisini er neyðugt við kapitali.**

Kaj Leo Johannesen
*Sambandsflokkurin*



Størsti trupulleikin í dagsins samfelag er, at bilurin (vinnulívið) sleppur ikki at virka til fulnar, tí politikarar sita á baksetrinum, haðani teir royna at stýra.

Tað fyrsta neyðuga vinnupolitiska átakið má tí vera, at tey á baksetrinum sleppa róðrinum. Her verður hugsað um tær kreppuloysnir sum gjørdar vóru fyri 10 – 15 árum síðani, og sum møguliga vóru rættar tá, men sum nú forða fyri, at føroyingar hava eina virðisskapan pr. íbúgva, sum er ájøvn við hini Norðurlondini. Sambandsflokkurin metir tað verða skeivt, at tað almenna framvegis eigur 61 % av øllum tøkum partapeningi í grunnum og partafeløgum í Føroyum.

### Ræðast vit kapitalin ?

Tað eru tvey ting sum eru neyðug, um eitt land skal vera kappingarført. Tey eru útbúgving og kapitalur.

Øll heimsins lond uttan undantak gera ein stóran innsats fyri at tiltrekkja útlendskan kapital. Men í Føroyum tosa vit um, hvussu vit skulu forða útlendskum kapitali í at koma inn, og samtíðis spyrja vit, hví eingin áhugi er frá útlendskum íleggjarum.

### Føroysk vinnulívsfólk

Tað krevur veruliga sín mann ella kvinnu at seta eina fyritøku ígongd. Hetta skal lærast, og tað kann gerast ein dýrur lærupengi. Tað kann vera, at hugskotið var ikki tað rætta. Tað kann vera, at tú setti skeivan persón í starv. Møguliga var marknaðurin ikki tilreiðar. Møguliga tókst tú eina ella fleiri skeivar avgerðir, og úrslitið er ofta, at tú fert á húsagang.

Tað er burturvið at ein skal verða liðugur fyri allar tíðir sum ígongdsetari, tí ein einaferð er farin á húsagang. Tú eigur at hava meira enn tann eina møguleikan. Tað er heilt galið fyri eitt samfelag, um eingin torir at seta nakað ígongd. Tað eigur ikki at verða ein vanlukka fyri eitt land, at onkur torir at taka ein vága, tí í longdini er tað dýrari fyri landið, um eingin tekur vágan.

Tað er eingin grund til at fólk sum hava gjørt eina reiðiliga roynd at stovnseta eina fyritøku, skulu forfylgjast óendaliga.

### Hesin hugburður hevur sínar røtur

Tað sum hevur fostrað henda skeiva hugburð í Føroyum, er vinnulívið í 80-unum, har tað almenna sat eftir við rokningini. Tað er sjálvandi burturvið. Harumframt kenna vit donsku heitini "selskabstømning" ella "konkursryttere".

Vit hoyra umaftur og umaftur at grundin til, at tað almenna eigur fyritøkurnar í dag, er, at tað privata vinnulívið kláraði ikki at reka fyritøkurnar. Eg haldi at størsti trupulleikin tá og fram til dagin í dag er, at vit tora ikki, ella vilja ikki hava kapping, um tað nú møguliga skuldi rakt onkran sum vit varða av, tað verði seg vinir, kenningar ella lokalt øki.

### Útbúgvingarskipanirnar nærri at vinnulívinum

Tað persónliga frælsið eigur aftur at verða sett á dagsskránna í Føroyum. Fyri at verða við í globaliseringini eru vit noydd, bæði sum menniskju og sum fyritøkur, at umstilla okkum, og verða før fyri at staðfesta, hvørji felagsvirði, vit framyvir fara at hava saman við vesturheiminum.

Vit kunnu ikki ræðast bæði føroyskar og útlendskar íleggjarar. Einskiljingar eru neyðugar, og útbúgvingarnar eiga at verða fluttar nærri at vinnulívinum.

Vit vilja hava vøkstur og vælferð, men ongar broytingar, og tað er eitt paradoks.

# »Rættvísi«

Súsanna Dam



Ofta verður sagt, at tú ført tað stjórn, sum tú vilt hava, og at stjórnin – í einum fólkaræði – avspeglar fólksins vilja. Við hvørt má eg ivast í um hetta nú er rætt. Kann tað veruliga bera til, at tríggir fimtipartar, t.e. 60%, av Føroya fólki ikki halda, at viðurskiftini hjá teimum samkyndu eru so ótrygg, at teirra tilverurættur átti at verið tryggjaður við lóg.

20 menn av teimum 32 fólkunum, sum vit hava valt á ting, nokta at viðurkenna, at tey samkyndu í Føroyum hava tørv á serligari verju, orsakað av teirra ikki so vanligu lívfrøði.

Um veruliga 60% av veljarunum eru samdir við hesar tingmenninar, so hava vit øll somul rættiliga ein trupuleika. Tí so hava vit gloymt ella ongantíð lært, at frælsi handlar um, at hvør einstakur okkara, hevur rætt til at liva sambært sína sannføring og fyritreytir undir ábyrgd.

Um hesar 20 tingmennirnar, sum atkvøddu ímóti, kundi verið sagt so mangt. Eg tími ikki at siga tað, tí øll vita tað, men tá fleiri av teimum hava nýtt Bíblina til at verja sítt trongskygni, so fari eg í staðin at spyrja, um teirra egni status í mun til Bíblina er á slíkum støði, at teir ótta- og ivaleysir kunnu lóggeva um, hvat er rætt og rangt hjá ørðum grundað á Guðs orð.

Avoldaðar stívrendar áskoðanir hava ongantíð bygt nakað sum helst uttan armóð, men hava altíð kunna verið nýttar til at skapa orðsnidlingum løtuvinning. Skulu vit harafturat dragast við altjóða glós og skomm fyri okkara líkasælu, so tykir mær hendan vinningin sera dýrt keyptan.

Tvørsøgnin til áskoðan tingmeirilutans er, at hann er hitt best hugsandi prógvið um, at tey samkyndu hava størsta tørvin á at verða vard ímóti mismuni.

# Gengangeren

Leif Jacobsen
*Eiði*

Efter at have modtaget meddelelsen, om at Færøernes Lagting for anden gang har nedstemt et lovforslag om "Forbud mod diskrimination på grund af seksuel orientering", må jeg erkende, at et vist gespenst, en genganger, endnu en gang har været på spil.

Gengangeren nægter både at dø og leve. I to tusinder år har han hængt på et kors og lidt for verdens skyld. I to tusinder år har han forkyndt synden som sandheden om mennesket og proklameret lidelsen som sandheden om verden. I to tusinder år har hans personlige lidelseshistorie forjættet forløsningen af verdens smerte til fordel for en lidelsesløs, lidenskabsløs og livløs evighed. En evighed, hvor ikke blot døden, men tillige verden er en saga blot.

I to tusinder år har Kristi lidelse, død og dom været Svaret. Intet over og intet ved siden af. Vejen, Sandheden og Livet. Indiskutabelt og inappellabelt.

På denne ultimative dommers befaling standsede alle andre veje, på hans bud ophørte ethvert oprør, og over for hans dom måtte al frihedstrang vige. Ingen kan slå en handel af med Sandheden og ingen unddrage sig Dommen.

Let legitimeres i det Absoluttes navn selvfølgelig dermed den fuldstændige undertrykkelse og den totalitære lovgivning. Er ikke alle netop syndere for Ham, hvorfor skulle så ikke alle tilsvarende være skyldige for den magt, der afspejler og håndhæver Hans Lov?

I Hans navn gjordes underkastelsen enhver undertrykker til en dyd. Under Hans sandheds vægt blev kulturer knust og folkeslag udslettet, fordi de levede i den syndige vildfarelse, at også deres sandheder, love og goder var sande, rette og gode. Ved Hans Dom knæsattes livets forbitrelse, seksualitetens forbandelse og verdens fordærv.

Nu smuldrer Sandheden Efterhånden står kun skallen tilbage, forgæves søgt blødgjort af kirkens kræmmere. Vejen, Sandheden og Livet er ikke mindre intolerancens fremmeste skal, uanset hvad den stoppes ud med, for hvad der er vejen, sandheden og livet for én messias, én magthaver eller ét menneske, kan ikke undgå at være vildnisset, falskheden og døden for en anden. Og lige så lidt kan ordren om at følge denne ene vej, denne ene sandhed og dette ene liv undgå at undertrykke al tilbøjelighed til at følge enhver anden.

Gengangeren går igen. Hans sædekorn spirer – om ikke længere i den verdensforladende salighed, han forjættede, så i dennes slægtninge af næsten lige så indiskutable og inappellable ekkoer. Fjerne og forvrængede ekkoer – men immervæk ekkoer. Som ein Volk, ein Reich, ein Führer kun er den yderste skal om det totalitære ekko fra én kirke, én frelse, én pave. Og som dette igen kun er den yderste skal om det intolerante ekko fra én udvalgt skare, ét himmerige, én forløser.

Undertrykkelsen varierer, og intolerancen veksler, men kimen er den samme, ensrettende vej, sandhed og liv. Det første, sidste og eneste Svar på et og alle spørgsmål. Det ultimative tyrannis ophav og grundsten, der har hjemsøgt mennesket i over to tusinder år.

Men af hvilken grund skulle dog nogen kunne få sig selv til at så sæden til en sådan ensretning og dermed til den ubeskrivelige rædsel, som denne ensretning uundgåeligt har affødt? Af naivitet? Grusomhed?

Nej, af kærlighed.

Af kærlighed til sin sandhed, sandheden om et rige uden for verden, uden verden, uden modsætninger. Uden lys eller mørke, liv eller død, uden forelskelse eller forargelse. Sandheden om nødvendigheden af endeløse lidelser for det endeløse ophør af den verden, der er al lidelses ophav. For hvor der ikke er nogen verden, er der ikke nogen lidelse. Verden er ondets rod, som den er stammen og frugterne på det figentræ, som Kristus på vej fra Betania til Jerusalem forbander, lader visne og dø – kun for at opfordre sine disciple til at gentage det destruktive mirakel.

Men figentræer bærer stadig frugt, og verden er ikke overvundet. Og i mellemtiden har forløseren hængt på et kors og lidt for verdens skyld i to tusinder år.

Måske det var på tide at fatte barmhjertighed med den lidende menneskesøn, tage ham ned fra sit torturinstrument og langt om længe stede ham til hvile i den jord, af hvilken også han er kommet. Måske vi med ham endelig kunne begrave Sandheden, Vejen og Livet, og en gang for alle slippe for ethvert religiøst, ideologisk og politisk ekko fra dette ubøjelige diktat, Frihedens, Medmenneskelighedens og Verdenshåbets modstander par excellence. Måske, om mennesket forløste forløseren fra korsets lidelser og fjernede naglerne fra hans kød, han endelig ville forsone sig med den verden, han har lidt sådan for at undslippe.

Og måske han sågar ville undlade at hjemsøge politikerne næste gang de skal foretage en afstemning.